# Tiltøk

**Gudstænastur sunnudagin**
**Havnar kirkja:** kl. 11
Ann D. Hansen
**Hoyvíkar kirkja:** kl. 11
Sonja Klein. Sunnudagsskúli er undir gudst.
**Vesturkirkjan:** kl. 11
Niels Pauli Danielsen. Sunnudagsskúli er undir gudst.Talvan gongur fyri KFUK í Havn
**Argja kirkja:** kl. 11
Bergur Debes Joensen, altarg. Sunnudagsskúli er. Talvan gongur fyri KFUK í Havn.
**Hests kirkja:** kl. 12
Derhard Jógvansson
**Haldórsvíkar kirkja:** kl. 12
Bergtórur Hjelm Bjarkhamar, altarg.
**Musikgudst. í Leirvík:** kl. 12 v/ Anne Mette Greve Klemensen. Morgenmad i missionshuset 10-12. Alle er velkomne
**Tvøroyrar kirkja:** kl. 11
Jónsvein Bech, altarg.
**Hvalbiar kirkja:** kl. 12.30
Jónsvein Bech, talvan gongur fyri Sunnudagsblaðið
**Sandvíkar kirkja:** kl. 18
Jónsvein Bech
**Glyvra kirkja:** kl. 11
Meinhard Bjartalíð, sunnudagsskúli
**Sjóvar kirkja:** kl. 12
Símun P Jacobsen, altarg.
**Christianskirkjan:** kl. 11
Hanus á Gørðum
**Kunoy:** kl. 12
Lestur
**Fríðrikskirkjan:** kl. 11
Martin R. Jacobsen, altarg.
**Gøta:** kl. 12
Henning Bøgesvang
**Sandavágur:** kl. 11
David Johannesen
**Norðskála:** kl. 12
Emil Olsen, messa
**Vestmanna:** kl. 11
Theodor E. D. Olsen
**Klaksvíkar sjúkrahús:** kl. 10
Elsa Funding
**Viðareiðis kirkja:** kl. 12
Elsa Funding
**Bøur:** kl. 11
Inga Poulsen Dam, altarg.
**Sumba:** kl. 11
Patrick de Neergaard

**Kirkju- og missiónshúsið á Argjum**
Fríggjakvøldið kl. 20 Møti við Sólbjørg Símunarson. Sangur: Eydna og Jens Súni.
Leygarkvøldið kl. 20 Møti við Símun P. Jacobsen, presti. Sangur: Str eingjakórið í KFUM&K. Innsavnan.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti við Hanus í Gørðum, presti. Sangur: Argjakórið. Innsavnan.

**Lívdin í Skúlanum við Løgmannabreyt**
Leygarkvøldið Alive - ungdómsmøti kl. 21 Símun Absalonsen talar um evnið "Breyð lívsins".
Sunnudagin Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30, lovsongur og tala kl. 12. Á familjumøtinum verður kreativt familjuinnslag, tónleikabólkurin TOS luttekur. Á seinna møtinum kl. 12, luttekur tónleikabólkurin TOS eisini. Meðan seinna møti er kl. 12, verður barnaansing, sunnudagsskúli og UngLív.

**Samkoman Immanuel**
Fríggjakvøldið kl. 19 Kongsins Herlið, møti fyri børn frá 8 ár og uppeftir. Øll børn verða koyrd heim eftir møtið. Ungdómslegan verður í Dali hetta vikuskifti, tí verður onki ungdómsmøtið.
Sunnudagin kl. 11.30 Barnakórið venur. Kl. 12 Møti v/ ungdómsbólkinum. Sunnudagsskúli verður eisini. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur undir møtinum.

**Filadelfia Tórshavn**
Fríggjakvøldið kl. 20 Mammur hittast til bøn. Leygarkvøldið kl. 21 Flare. Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, Tummas Jacobsen talar kl. 13.15 Sunndagskool.
**Ebenezer**
Sunnudag kl. 11 Minnismáltíð Harrans. Barnaansing í Lítla Sali. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangelisktmøti. Barnaansing í Barnarúminum. Mánakvøldið Kl. 20 Kvinnumøti

**Frelsunarherurin Tórshavn**
Sunnudagin kl. 11 Halgunarmøti, Finnbogi Olsen talar. Kl. 11 Sunnudagsskúli. Kl. 17 Møti v/ Eingrím Holm og Solberg Jacobsen.

**Evangeliihúsið, Tróndargøta**
Sunnudagin kl 11 Familju og morgunmøtið, UV-night kl 19.

**Katólska kirkjan**
Hvønn dag kl. 17.30 verður Orðsinstænasta við kommunión í Kerit.
Fríggjadagin kl. 17.30 messa í Kerit.
Leygardagin kl. 11.30 messa í Kerit. Kl. 13.30 verður inspiratiónsdagur v/Inge Lise Lollike, forkvinnu fyri Kvinnubønardegnum í Danmark, hildin í kirkjukjallaranum og allar kvinnur eru vælkomnar. Komið og havi ein gleðiríkan dag saman við øðrum kvinnum frá ymiskum meinigheitum. Sigið mær bert frá frammanundan (Sr. Marisa tel. 315386).
Sunnudagin kl. 11 hámessa v/Alren Soosaipilai, prestur í Mariukirkjuni. Eingin sunnudagsskúli verður. Tað er tilbiðjan av Heilagan Sakramentinum í Kerit frá kl. 17 til 18. Øll eru vælkomin.

**Fríkirkjan Oasan**
Fríggjakvøldið kl. 20 After8
Sunnudagin kl. 11 Sjóvarps Guðstænasta v/Anniku við Skipá kl. 12 sunnudagsskúli.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti

**Samkoman Marknagil**
Sunnudagin kl. 10.30 Breyðbróting. Kl. 12 Sunnudagsskúli. Kl. 18 Evangeliskt møti
Mánakvøldið kl. 20 Bønar/ uppbyggingarmøti.

**Hebron á Argjum**
Fríggjadagin kl. 10 Bønarløta fyri kvinnur og menn.
Sunnudagin kl. 10.30 Morgunmøti. Kl. 12 Sunnudagsskúli og møti. Jógvan Jacobsen talar. Evni: Efesusbrævið. Kl. 20 Ungdómsbólkur.

**KFUM og KFUK í Havn**
Mánadagur 14. febr. kl. 15 í KFUK: Seinnapartsamkoman við Óluvu Djurhuus. Evni: Pílagrímsferð til Santiago de Compostela.

**Meinigheitshúsinum í Havn**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 18. Onki møti víst verur til missiónsviku á Argjum

**Sjómanskvinnuringurin í Havn**
Vit koma saman í Meinigheitshúsinum mánakvøldið kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoman**
Møti verður sunnukvøld kl. 18. Øll eru vælkomin.

**Missiónshúsið á Sandi**
Sunnudagin sunnudagsskúli kl. 14 og møti kl. 18 v/Sølva Mortensen. Egin, Sølvi og Terji syngja

**Missiónshúsið í Skopun**
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti v/Petur Poulsen

**Filadelfia Vágar**
Sunnudagin kl. 11 møti við Sam Jacobsen. Kl. 11.30 sunnudagsskúli.

**Sjómanskvinnuringurin í Sandavági**
kemur saman týskvøldið kl. 20 í meinigheitshúsinum. Innsavnan til Sjómansmissiónina. allar kvinnur eru hjartaliga vælkomnar.

**Kvívík**
Møti verður sunnukvøldið kl. 18 í kirkjustovuni v/ Tummas Juul Askam.

**Kollafjarðar Missiónshús**
Sunnudagin verður sunnudgsskúli kl. 14 og møti kl. 18
Mánakvøldið verður juniorhugni kl. 19.30 fyri ung frá 5 klassa og uppeftir.

**Lívsins Orð, Saltangará**
Sunnudagin kl.10.30 Møti

**Meinigheitshúsið á Skála**
Fríggjakvøldið kl. 19 juniormøti
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti Luttøka frá bibliuskúlanum í Børkop.
Sunnudagin kl. 13.30 sunnudagsskúli. Kl. 18 møti við Bartal Danielsen, evni Kirkjuliðið í Pergamos. Barnaansing.

**Tabor, Toftir**
Missiónsvikan heldur fram:
Fríggjakvøldið kl. 19.30 talar Johan Henriksen og KFUM/K kórið í Klaksvík syngur.

**Hagafundur**
Lýst verður til hagafund hjá Hagapartinum Innan Gjógv, Skála, mikudagin 02.03.2011, kl. 19 í Skála skúla.
Dagskrá:
1. Val av orðstýrara
2. Framløga av roknskapi
3. Val av hagastýri
4. Ymiskt
Hagastýrið

**Keldan, Skálafirði**
Vikuskiftismøtir við Eivind Frøen, leygarkvøldið kl. 21 og sunnumorgunin kl. 11. Barnamøti kl. 11.

**Stranda Missiónshús**
Sunnukvøldið kl. 18
Møti v/Símun P. Jacobsen. Innsavnan til húsið.

**Kambsdalur, Handilsskúlin**
Sunnudagin kl. 11 Breyðbróting
Týskvøldið kl. 20
Bønar-og uppbyggingarmøti.

**Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum**
Fríggjakvøldið kl. 21 Ungdómsmøti
Sunnudag kl. 17 Ungdómsnevdin skipar fyri møti. Sunnudagsskúli. Um tær manglar fart, so ring á tlf. 447090 ella 775091.

**Missiónshúsið á Selatrað**
Møti sunnukvøldið kl. 18. Sverri og Julia Kass, tala og syngja.

**Frá Christianskirkjuni**
Til hugnaløtuna í kirkjukjallarnum hin 11. febr. kemur Ísak Mikaldal at greiða frá ymiskum ferðafrásagnum, annað verður eisini á skránni. Vit byrja kl. 15. Øll eru vælkomin

**Soli Deo Gloria**
Sunnukvøldið kl. 18 møti v/ Signu Andersen.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti

**Getsemane, Klaksvík**
Fríggjakvøldið kl. 20.30 Ungdómsmøti.
Sunnukvøldið kl. 18 Møti v/ Høgna á Reynatrøð & Eivinn Bringsberg. Barnamøti er samstundis.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti v/ breyðbróting.

**KFUM & K í Klaksvík**
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli. Kl. 17.30 Bønarløta. Kl. 18 Møti við Bláakorss. Kl. 21 Ungdómsmøti.

**Missiónshúsið á Viðareiði**
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Snorra Brend. Evnið er: "Støður sum skaptu sangir". Greitt verður frá søguni aftanfyri fyri gomlum og nýggjum sangum, og sum síðani verða sungnir. Lurtað verður eisini eftir fløgum.

**Missiónshúsið á Tvøroyri**
Missiónsvikan á Tvøroyri í døgunum 8.-13. febr.
Fríggjakvøldið kl. 20 verður við Jógvan Højgaard, trúðboðara og Katrin Mortensen. Kórið á Tvøroyri syngur. drekkamunnur verður aftaná.
Leygarkvøldið kl. 20 verður møti við Olaf Magnussen og Margeir Toftegård. Kórið úr Þorkeri syngur. Drekkamunnur verður aftaná.
Sunnukvøldið kl. 18 verður møti við Margeir Toftegård og Jógvan Højgaard, trúboðara. Kórið úr Sumba syngur. Innsavnan verður til húsið. Barnaansing verður. Náttурði verður aftaná. Bønarmøti verður hálvan tíma áðrenn hvørt møti. Øll eru vælkomin.

**Aglow Suðuroy**
Fundur verður í Húsmøðrafelagshúsinum í Vági mánakvøldið 14. febr. kl. 19.30. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Betania Sumba**
Sunnukvøldið kl. 18. Øll eru hjaraliga vælkomin.

**Missiónshúsið í Vági**
Hvørt týskvøld kl. 20 er bønarmøti.

**Tilhaldið í Tórsgøtu**
*tlf. 316491/286491*
*Opið er mánadag-hósdag kl. 9-17 og fríggjadag 9-16*
*tilhald@torshavn.fo*
*Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.*
Mánadagur
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið. Í motiónsrúminum er rógvimaskina, kondisúkkla, renniband og krossari.
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 11 Enskt talumál í køkinum á 1. hædd.
Kl. 14-16 Nýtt telduskeið grundskeið byrjar í viku 6 (7.feb.) Páll Poulsen. Tilmelding: 316491.
Kl. 15 **OBS!!!!** Nýtt tiltak í Tilhaldinum. Heilafimleikur. Halgir og Ása W. Poulsen læra okkum at scrabbla. Scrabblespælið kom á føroyskum til jóla 2010. Øll eru vælkomin.
**Tilhaldið verður 13 ár 12. mars.** Føðingardagur verður mánadagin 14. mars. Somuleiðis verður nevndarval mánadagin 14. mars. Tveir nevndarlimir standa fyri vali (Katrin Dahl og Eilif Samuelsen). Uppskot til nevndarvalið skulu leggjast í postkassan í gongini.
Týsdagin
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið.
Kl. 10 Sangur, Óli Vang. Øll eru vælkomin.
Kl. 11-13 Nýtt víðkað telduskeið byrjar í viku 6 (8.feb.).
Kl. 14-16 Nýtt víðkað telduskeið byrjar í viku 6 (8.feb.) Páll Poulsen. Tilmelding: 316491.
Kl. 15 Prát. Øll eru vælkomin.
Mikudagin
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið.
Kl. 9 Horn- og beinarbeiði, Rasmus Nygaard. Støkk inn á gólvið og vita um hetta hevur tín áhuga.
Kl. 9 Veving, Joana Bjarnastein
Kl. 9 Maskinbinding, Marita Guttesen.
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn eru vælkomnir.
Kl. 9 Bindiklubbur. Hittast í stovuni á veghæddini.
Kl. 14-17 Prát.
Hósdagin
Kl. 9-17 Motiónsrúmið opið, vegleiðing kl. 15-16 Arnhold Fjalstein.
Kl. 10 Fimleikur fyri kvinnur, Greta Ellingsgaard. Allar kvinnur eru vælkomnar.
Kl. 11 Lesibólkurin hittast 24. febr. kl. 11. Vit lesa: Norska Løva, Jógvan Isaksen. Samskipari Marna Olsen.
Kl. 14-16 Boccia í kjallaranum, Alma Poulsen. Vit trena til kappingina í mai mðr.
Fríggjadagin
Kl. 9-16 Motiónarúmið opið.
Kl. 9.30 Fimleikur menn, Dánjal Húsgarð. Allir menn vælkomnir.
Kl. 13-16 Prát.
*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Losjan í Havn, Tinghúsvegur 18**
Fríggjadagin kl. 15 hittast tilkomin og eldri til hugna.

**Pensionistafelagið í Havn**
*Tlf. 222733*
*finnurj@post.olivant.fo*
Vit hittast í Losjuni.
Limirnir hittast í Losjuni.
Mikudagin 16. februar kl. 18 hevur felagið bingo í Losjuni.

**Tilhaldið Hugnin í Sandoy**
*hevur opið mánadag og mikudag frá kl. 13 til 17. Báðar dagarnar er drekkamuður at fáa. Øll eru hjartaliga vælkomin.*

**Samuelskirkjan**
Tað er gudstænasta 1. og 3. sunnudag í mánaðnum kl. 14. Aftaná bjóðar kirkjuliðið til ein drekkamunn í kryptini. Hjálpi Føroyska Kirkjuliðinum í Keypmannahavn við at varðveita kirkjuna og føroyska prestin. Løgtingið hevur yvirtikið kirkjuna so vit mugu taka saman um hendur annars missa vit alt. Møtið fjølment í kirkju!
Guðstænastunar eru:
20. febr, 6. marts, 20. mars, 3. apríl, 17. apríl, 1. páskadag, 1. mai, 15. mai, 5. juni, 19. juni.

**Landsfelag Pensjónista**
*Tróndargøta 13, Tórshavn*
Tlf. 319394 ella 219394
Skrivstovan er opin týsdag frá kl. 13 til 16.
landsfelagpensjonista@olivant.fo

**Dagtilhaldið í Nólsoy**
er opið mánadag, týsdag og hósdag frá kl. 13-17. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið í Runavíkar Kommunu**
*Vit halda til í húsinum hjá Nón á Torvgøtu 2, Saltangará.*
*Opið er mánadag til hósdag frá kl. 14-17.*
Høvi er at gera ymiskt handaligt arbeiði, spæla kort, boccia og onnur spøl. Týsdag er fimleikur/styrkivenjing. Bløðini eru til taks og ein góður drekkamuður. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Dagtilhaldið á Toftum**
*Opið er hesar dagar: týsdag, mikudag og hósdag frá kl. 15 til 18.*
*Øll eldri eru vælkomin*

**Dagtilhaldið í Fuglafirði**
*Opið er: Mánadag, týsdag og mikudag frá kl. 15-18.*

**Tilhaldið Sóljan**
*Klaksvíksvegur 35*
*Klaksvík · tlf. 459091*
*dagtilhaldid@post.olivant.fo*
*Opið er: Mánadag til hósdag kl. 13.30-17.30*
Hvønn dag er ein góður drekkamunnur at fáa, eins og bløðini eru til taks. Møguleiki er at gera ymiskt handarbeiði, spæla kort, bobb, telva o.m.a. Hvør dagur endar við andakt og sangi. Øll vælkomin.

**Dagtilhaldið Blákollan á Oyri**
Opið er týsdag og hósdag frá kl. 14-18. Øll eldri eru hjartaliga vælkomin.